LM-099/2023

Fylgiskjal 49

Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um burðadygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

Almennar viðmerkingar

Føroya Óðalsfelag takkar fyri, at landsstýrismaðurin hevur sent uppskotið til løgtingslóg um burðadygga ferðavinnu til hoyringar hjá Óðalsfelagnum.

Áðrenn uppskotið varð sent til hoyringar, hevur felagið verið á fund við landsstýrismannin um tað sama, tó uttan at hava sæð uppskotið. Líka frá byrjan av, hevur felagið givið til kennar støðuna hjá felagnum, bæði alment, í skrivum til landsstýrismannin og á fundum saman við politiska myndugleikanum. Tí harmar tað felagið, at landsstýrismaðurin nú við fyriliggjandi uppskoti, nærum fullkomiliga hevur sæð burtur øllum frá tí sum Óðalsfelagið hevur vist á.

Høvuðsáskoðanirnar hjá felagnum hava verið og eru framvegis:

1. At allir føroyingar, uttan gjald, skulu kunna sleppa at ferðast og fara allastaðni í landinum, um tað ikki er til ampa fyri fólk, fæ, ogn, vøkstur og náttúru, ella er teimum sjálvum beinleiðis vandamikið.
2. Vinnulig ferðavinna, ella tað sum í uppskotinum í § 2, stk. 1, ad. 2 verður rópt *Handilslig ferðavinna*, skal tó ikki vera fevnd av ásetingini í pkt. 1 omanfyri.
3. Ognarrætturin má sær ráða - hetta merkir, at tað er hagin, ikki kommunur, landsstýrismaðurin ella aðrar tilvildarliga valdar nevndir, ið skulu avgera hvussu raksturin av haganum verður skipaður.

Til einstakar §§ og tilhoyrandi viðmerkingar.

Til § 1

Føgru orðini í endamálsorðingin í § 1 kunnu allarhelst tey flestu taka undir við í sjálvum sær. Tó so, meta vit ikki, at endamálsorðingin samsvarar við aðrar partar í uppskotinum. Eitt nú er ásett í pkt. 3, at samstarv millum ferðavinnu og aðrar vinnur skulu styrkjast. Avleiðingarnar av hesum uppskotinum koma at viðføra júst tað øvugta, tí hetta uppskotið tekur verandi rættindir frá teimum, ið eiga jørðina at reka ferðavinnu. Hetta uppskot er alt annað enn burðadygt. Uppskotið leggur upp til hópferðavinnu har útlendsk ferðafólk fyri kr. 150,- skulu kunna fara har tey hava hug til.

Til § 2

Litra 1 umtalar tey, ið búgva á staðnum. Spurningur kann setast við hvørji hesi eru. Eru tað tey, ið hava skrásettan bústað, sambært landsfólkayvirlitinum, ella tey sum eru skrásett og veruliga búgva í bygdini?

Til § 3

Sum nevnt omanfyri, so er okkara greiði hugburður, at tað skal vera ókeypis hjá føroyingum at ferðast í haganum og fram við strondini. Fyriuttan portrið í Saksun, hevur tað heldur ikki verið ein trupulleiki hjá føroyingum at fara í fjøllini ella út til Strondina.

Vit taka ikki undir við at rætturin hjá teimum einstøku høgunum, at krevja gjald frá útlendskum ferðafólki skal avtakast. Ein partur av góðu menningini av ferðavinnuni kring Føroyar er júst tí lokalar kreftir hava havt møguleikan at skipa seg og kravt gjald frá útlendskum ferðafólkum. Tí halda vit tað er marghátligt, at tað skal vera so umráðandi fyri Landsstýrismannin, at lóggeva, at tað skal vera ókeypis fyri útlendsk ferðafólk, og harvið forða fyri, at lokalu støðini í landinum kunnu hava eina inntøku av útlendskum ferðafólkum.

Ásetingin í § 3 er hvørsmansrættur, ið skal geva øllum heimsins borgarum rætt, fyri kr. 150,- at fara har tey hava hug til í Føroyum. Eitt sjónarmið hjá landsstýrismanninum fyri hvørsmansrætti hevur verið, at hann vil samanbera Føroyar við Noregi. Noregi er 385.206 km2, Føroyar bert 1.400 km2. Bara hetta faktum, átti at fingið ein og hvønn at viðurkent, at tað ber ikki til at samanbera Noregi við Føroyar.

Umframt at Noregi er áleið 275 ferðir størri til víddar enn føroyska landøkið, so kann sum dømi um ymiskar kringumstøður nevnast, at jarðarviðurskifti og siðvenjur í Føroyum eru heilt øðrvísi enn í Noregi. Í Noregi er stórur partur av lendinum skógur, hálendi, órørt lendi, meðan bert ein lítil partur, 3,5 prosent, er landbúnaðarøki. Umvegis eitt avmarkað slag av hvørsmansrætti hevur norski almenningurin og ferðafólk atgongd til stórar villar víddir í Noregi, har tey als ikki kunnu órógva vøkstur og djóralív og landbúnað á sama hátt sum í Føroyum. Men í Føroyum vildi ein universellur hvørsmansrættur verið ein vanlukka. Tí við væl minni vídd av náttúru, tolir føroyska náttúran eisini væl minni trýst. Seyðurin hevur atgongd til beitilendið á allari uttangarðsjørðina alt árið, og rætt til vetrarbit av innangarðsjørðini vetrarhálvuna. Í Føroyum verður stórt sæð øll jørðin gagnnýtt til mat-framleiðslu til føroyingar.

Ein skjót leiting á internetinum vísur, at ferðafólkatalið í Noregi í 2021 var 1.44 milliónir. Um tað er ætlanin hjá landsstýrismanninum eisini at samanbera við Noregi her, og fáa líka so nógv fólk til Føroyar at ganga frítt í høgunum, so verður slitið skjótt ótolandi og náttúran fer at liggja í knúsi, uttan mun til hvussu nógvar gøtur vera gjørdar.

Til § 4

Ásetingarnar um atburð í § 4 eru áhugaverdar. Serliga halda vit at ásetingin í stk. 4, um forboð fyri at hava hund við í hagan er góð. Eisini kunnu vit taka undir við ásetingina í stk. 5, ið ásetur, at eigari hevur rætt at burturvísa fólki, ið ber seg fyrilitarleyst at, ella er ognini til ampa.

Til § 5

Verður ásetingin í § 5, stk. 2 strikað, kunnu vit taka undir við ásetingin í § 5, stk. 1. Rætturin hjá eigaranum, at nokta fyri allari handisligari ferðavinnu kann ikki skerjast. At taka vinnurættin frá eigara á privatum ognarmatrikli, fyri at geva vinnurættin til øll onnur vinnurekandi, er ognartøka.

Um ein eigari ikki ynskir, at útlendskir ferðafólkabólkar skulu í hagan hjá honum, skal tað framvegis vera hansara rættur at nokta teimum atgongd. At taka henda rættin frá eigaranum, máar burtur grundarlagið hjá eigaranum at samráðast um avtalur, og harvið vinnuligu karmarnar hjá eigaranum at reka handilsliga ferðavinnu, tí við hesum uppskotinum, verður eigarin noyddir at taka móti øllum útlendskum ferðafólkum, til eina standardavtalu ásetta av landsstýrismanninum.

Til § 6

Um ferðavinnuætlanir skulu gerast, so skulu tær sjálvandi gerast lokalt, hesum taka vit undir við. Tað kann tó ikki vera kommunan, ið skal avgerða innihaldið av ferðavinnuætlanunum. Tær størri kommunurnar hava møguliga betri umstøður, at framleiða umsitingarligar tungar uppgávur, men tað skal ikki vera teirra ábyrgd og skylda. Um ynski er, at fáa kommunurnar við, so kundi orðingin verið umskrivað soleiðis, at tað eru hagarnar, ið kunnu, saman og við hjálp frá kommununum, sum gera eina ferðavinnuætlan fyri økið.

Til § 7

Til hesa ásetingin er at siga, at hetta skilja vit als ikki. Lokali borgarin, ið býr á staðnum, er umboðaður av síni kommunu og er hetta bert ein eyka umsitingarlig fløkja og púra óneyðug.

Í teimum førum, har tað eru staðbundnar nevndir sambært § 37 í løgtingslóg um kommunustýri, skulu hesar hoyrast um mál sum viðvíkja økinum staðbundna nevndin umboðar. So eisini her, er tað púra óneyðugt at stovnseta enn eina nýggja nevnd, at skipa fyri rakstri av nøkrum sum longur nú er staðfest í aðrari lóggávu.

Til § 8

At uppgávurnar vera lagdar til kommunurnar hava vit ikki fleiri viðmerkingar til, tó skal aldrin vera nakað ivamál um, at tað er eigarin, ið skal hava síðsta orð at siga, um nýggjar gøtur skulu gerast og hvar hesar skulu gerast.

Til § 9

Aftur her, verður tað lagt til kommununa, í samráð við eigara at áseta skilhaldsreglur. Tað er í lagi, at kommunan er við, men tað skal vera eigarin, ið hevur avgerðarrættin, um og hvørjar skilhaldsreglur skulu vera galdandi í hansara haga.

Til § 10

Tað framgongur av viðmerkingunum til § 10, at landsstýrismaðurin tulkar ognarrættarhugtakið alt ov smalt. Lesnaðurin á síðu 17 í uppskotinum er serliga órógvandi:

> *"Tá ið mett verður um virðið á ognini, eru bara landbúnaðarviðurskifti viðkomandi, t.e. virðið á ognini sum landbúnaðarjørð. Hetta merkir, at viðurskifti sum náttúruvakurleiki (herlighedsværdi), ferðavinnumøguleikar o.tíl. ikki eru viðkomandi fyri virðisásetingina."*

Her velur landsstýrismaðurin at tulka ognarrættin hjá óðalsfólki avmarkandi, til einans at hava eitt landbúnaðarendamál. Hetta er problematiskt eftir grundlógini § 73, sum sigur, at kravið er "*fuldstændig erstatning*". Sí viðmerking her:

> *"Udgangspunktet for fastsættelse af fuldstændig erstatning er det afståedes værdi i handel og vandel (handelsværdien). Denne værdi bestemmes ved en undersøgelse af, hvilke priser der på det pågældende marked betales for ejendom svarende til den afståede. Værdien i handel og vandel påvirkes ikke blot af ejendommens aktuelle beskaffenhed og udnyttelse, men også af de forventninger om fremtidig udnyttelse, der knytter sig til den pågældende ejendom, jf. om erstatning for forventningsværdi eksempelvis U 1975.718 H og U 2005.590 H. Erstatningen fastsættes ud fra, hvad en fornuftig køber må antages at ville have givet for pågældende ejendom i en handel på det frie marked." (Jens Peter Christensen, Michael Hansen Jensen og Jørgen Albæk Jensen, Grundloven med kommenterar, Djøf, 2015, s. 471).*

Altso, ikki einans fortíðar brúk, men eisini nútíðar og framtíðar (realistiskt forvæntað) brúk og virði inngongur í metingina av marknaðarvirðinum av eini ogn, sum skal takast við til "fuldstændig erstatning". Breiða ognarhugtakið, fevnir um allar lutir og lunnindi, eitt hugtak sum eigur at tulkast dynamiskt og víðkandi. Rætturin at dríva ferðavinnu á ognini, ella at gera samstarvsavtalur við onnur sum gera tað, er eitt lunnindi sum liggur til sjálva jarðarognina.

Mett verður heldur ikki at til ber í viðmerkingum til eina lóg, at eitt so fundamentalt hugtak sum ognarrætturin skal tulkast smalt. Í heila tikið er óðalsrætturin meira fundamentalur enn, at hann kann vera (restriktivt) defineraður í eini ferðavinnulóg.

Ognarrætturin til jørð kemur vanliga ikki í fleiri útgávum, og um ognarrætturin til hagan er kategori fyri seg og avmarkaður til landbúnaðarbrúk, so eigur landsstýrismaðurin at vísa á rættarkeldurnar og rættarsøguligu sannroyndirnar, sum prógva hetta.

Hetta er ikki í lagi og í stríð við grundlógina. At staðfesta eina umtulking av so fundamentalum viðurskiftum sum ognarrættinum í ikki-lógarteksti, men viðmerkingum til eina ferðavinnulóg, er átaluvert og vánaligur lógarteknikkur.

Harafturat er tað eisini ivasamt, um tað lógartøkniliga og fólkaræðisliga er í lagi at kollvelta viðurskifti hjá jarðareigarum grundað á eina lóg um ferðavinnu, heldur enn í eini landbúnaðarlóggávu.

Tá man í danskari og føroyskari lóggávutraditión er neyvur við at regulera ymisk øki har, tey hoyra heima, so er tað ikki bara teknikkur, men eisini grundað á, at fokus viðv. demokratiskari viðgerð og rættartrygd kemur skarpt á tað, sum broytast skal.

Ferðavinnulóggávan hevur annað endamál og annað fokus enn landbúnaðarlóggávan. Tí mugu viðurskifti, sum grípa inn í ognarviðurskifti hjá bøndrum og jarðareigarum ikki kollveltast (aleina) við lóggávu, sum realiserar ferðavinnuni virðir. Við hesum er ongin trygd fyri, at lóggevarin hevur neyvkannað alt viðkomandi og vent hvørjum steini.

Til § 11

Ásetingin í 11 má undir undir ongum umstøðum ávirka raksturin av haganum. Gamalt hevur eitt nú verið í Føroyum, at sleppa seyði í feitilendi. Hesi feitilendi kunnu vera ómetaliga brøtt og vandamikil fyri fólk, ið ikki eru staðkend og von at ganga í slíkum brattlendi. Tí kann tað vera hugsandi, at tað eru støð, har forboð skal setast teimum at fara, ið ikki eiga ella hava keypt rættin til at sleppa seyðin har. Eitt hugsað dømi kundi verið Lítli Dímun í síni heild. Oyggin er brøtt og trupul at koma til, og fyri tann ókenda kann tað vera sera vandamikið stað at vitja.

Til § 12

Føroya Óðalsfelag tekur ikki undir við, at føroyingar, ið fara í hagan, skulu umvegis eitt gjaldsportur, og kann tað einaferð enn vera endurtikið her, at føroyingar skulu kunnu fara í hagan uttan at skulu gjalda til nakran.

Víst verður eisini til felags yvirlýsing frá Óðals- og Bóndafelagnum dagfest hin 12. februar 2024.

> *"Føroyingar skulu ganga frítt í haga, eftir eini pragmatiskari umsiting av galdandi lóggávu. Fundurin er samdur um, at útlendsk ferðafólk einans kunnu ganga ókeypis eftir útvaldum almennum bygdagøtum. Skulu tey út um bygdagøturnar, skal hetta verða eftir fyriskipaðum gongutúrum, sum hagarnir og føroyska ferðavinnan gera avtalur um. Ferðaleiðarar skulu verða føroyskir. "*

Tá tað er sagt, so kunnu vit bert endurtaka, at vit taka als ikki undir við, at tað skal vera loyvt útlendskum ferðafólkum at fara ókeypis kring allar Føroyar. Tað má vera møguligt hjá eigaranum at skipa lokala virksemi á best hóskandi hátt.

Sum nú er, er grundarlagið fyri at hagapartar reka ferðavinnu, í tøttum samstarvi við ferðavinnuskrivstovur, sera væleydnað. Hetta sæst sum vælskipaði átøk kring alt landið. Fleiri ferðavinnuskrivstovur og ferðaleiðarar hava alment boðað frá, at tær eru sera væl nøgdar við samstarvið við jarðaeigarnar. Kundar og ferðafólk vilja fegin rinda gongugjaldið, tí tey vita, at tey tá eru í góðum hondum, við einum lokalum ferðaleiðara, sum er góður við sín egna haga, og kennir hagan betri enn nakar annar. Tey vita at hann kann føra tey trygt á túrinum, so tey ikki villast, ella ganga seg í óføri. Okkum kunnugt, so rinda flest øll útlendsk ferðafólk fegin tað tey skulu fyri at sleppa í hagan, um tey vita tað frammanundan. Havast skal jú í huga, at tey flestu ferðafólkini, ið koma til Føroyar, koma einaferð í lívinum, og rinda tey við gleði, tað tey skulu, fyri at gjøgnumføra teirra dreymaferð til Føroyar.

Sambært uppskotinum, verður tað nú eisini lagt upp til, at tann sum situr við jørðini, skal boða frá. Hetta vendir heilt skeivt. Tað er sjálvandi tann sum kemur inn á annan mans ogn, ið skal boða okkum frá. Tað eru

ikki vit, ið hava sitið við jørðini og hava røkt jørðina í øldir og framleitt stuttfluttan mat til føroyingar, ið nú skulu upplýsa øllum heimsins ferðafólkum, nær vit hava virksemi, í okkara egna haga.

Vit skulu sjálvandi ikki boða frá okkara vanliga rakstri av haganum. Tað má framvegis vera skyldan hjá teimum, ið ætla sær inn á okkara ognir at vitja, at boða frá. Rætturin hjá tí sum eigur og rekur vinnu á egnari jørð verður við hesum uppskotinum í § 12 mikið skerdur og kemur hetta at raka meint.

Í uppskotinum hjá Landsstýrismanninum eru skerjingarnar at reka landbúnað so víttgangandi, at tað millum annað verður ásett í viðmerkingunum, at eitt skelti, ið ávarar um, at tarvurin gongur leysur, verður at roknað sum ólóglig forðing og kann slík skelting enntá útloysa revsing sambært revsiásetingini í uppskotinum. Grundgevingin er, at landsstýrismaðurin metir, at hetta kann vera ein sálarfrøðilig forðing fyri tí sum ætlar sær í hagan. Uttan mun til um so er ella ikki, so kann tað hugsast, at ein leysur tarvur kann gera størri skaða á eitt menniskja, enn ávaringin um at tarvurin er leysur.

Av væl størri týdningi enn atlitið til ferðavinnuna, er atlitið til sjálva náttúruna. Tí skal rætturin hjá eigarunum sambært galdandi jarðarlógum, sum tryggjar hagastýrinum heimild at nokta útlendingum at fara í hagan, sjálvsagt virðast. Tað gevur onga meining tá § 12 tosar um, at vit sum eigarar bert kunnu avmarka ferðslu, "sum órógvar serligt landbúnaðarvirksemi, fjallgongu og veiðu".

Øll óneyðug, og fyri hagarøktina óviðkomandi ferðsla, er órógvandi fyri náttúruna.

Vernd, og mest møguligur friður, hevur avgerðandi týdning fyri gróður, seyð og heiðafugl.

Við at geva øllum heimsins borgarum frítt at fara, ókeypis og óskipað í øllum føroyskum høgum, ger lógarruppskotið seg inn á ta aldargamlu staðbundnu mentan og siðvenju, sum altíð hevur verið tann besti lokali verjugarðurin fyri okkara náttúru.

Til § 13

Sum útgangsstøði taka vit ikki undir við gjaldinum, og í øðrum lagi, um tað er so alneyðugt við gjaldinum, so kann tað góðtakast, um tað bert ikki ávirkar okkara verandi rætt, at krevja gjald frá útlendingum sum ætla sær í hagan, ella at nokta útlendingum at fara í hagan.

Til § 14

Ásett er at "Landsstýrismaðurin skal sambært § 14 áseta nærri reglur um, hvussu inntøkan verður býtt millum ávikavist kommunur og eigarar og brúkarar."

Hvussu kann landsstýrismaðurin hava heimild at áseta býtið av inntøkum, sum er genereað við brúk og belastningi av ogn hjá øðrum?

Til §15

Vit taka ikki undir við, at Landstýrismaðurin fær rætt at panta eigaran, um hann er ósamdur um skelting ella evt. forðingar.

Til §16

Vit taka undir við at tey, ið bróta skilhaldsreglurnar, verða revsaði við sekt.

Men vit taka ikki undir við at óðalsfólk kunnu verða sektað fyri ikki at útføra gerðir/ætlanir ið beinleiðis stríða ímóti teirra egnu ætlan og endamálið við teirri ogn. Vit halda at tað er sera løgið at revsingarnar venda mest ímóti eigarunum, og minst ímóti teimum óviðkomandi ferðafólkunum, ið koma inn á ognina.

Til § 17

Fyriuttan ásetingina um hundar, kunnu vit undir ongum umstøðum góðtaka, at galdandi greinar í girðingarlógini ella øðrum jarðarlógum vera settar úr gildið. Hetta er tað sum vit skipa raksturin av haganum sambært, og hetta eru rættindi, ið ikki eiga at vera broytt í eini ferðavinnulóg, sum einki eigur at hava við landbúnaðin at gera.

Vælgjørdu serføroysku jarðarlógirnar skulu hinvegin varðveitast, tí tær tilsamans eru besta amboðið til at verja náttúruna og landbúnaðin; Og tí eisini besta amboðið til at skipa eina veruliga burðardygga ferðavinnu.

Vælgjørdu føroysku jarðarlógirnar hava verið galdandi í øldir. Einfalda orsøkin til, at tær í stórum eru óbroyttar, er tí tær eru góðar. Tær eru akkurát líka so aktuellar í dag, sum fyri fleiri hundrað árum síðani. Tær tæna sínum endamáli, og verða brúktar hvønn einasta dag, í øllum hagapørtum, um alt landið. Uttan at fara í smálutir, regulera lógirnar øll tey viðurskifti sum tryggja okkum ein vælvirkandi føroyskan landbúnað. Sum dømi kann nevnast, at um ein ánari í einum norðurhaga, hevur neyðug ørindi í grannahaganum fyri sunnan, so fer hann ikki yvirum mark, fyrr enn hann hevur fingið loyvi frá røktingarmanninum í grannahaganum.

Órógva tit eitt vælvirkandi lógarverk, sum frammanundan skipar viðurskiftini púra greitt millum eigarar og hagapartar, so verður jú onki skil á, um øll, bæði ánarar, føroyingar annars, og eisini milljónir av ferðafólki, knappliga fáa fullkomiliga frítt at fara í øllum høgum. Tí undrast vit stórliga á, hví heitið á hesum lógaruppskoti, er "Burðardygg ferðavinna", tá hon í so stórum og avgerandi spurningum grípur órógvandi inn í jarðarlógir og landbúnað og náttúru.

Kravið má verða, at tit lýsa, og taka støðu til avleiðingarnar av, at nakrar av teimum týdningarmestu greinunum í jarðarlógunum verða settar til viks. Eftir okkara tykki verður ruðulleikin fullkomin. Oyðileggja tit føroysku jarðarlógirnar, so oyðileggja tit eisini føroyska landbúnaðin, og føroysku náttúruna.

Til § 18

Onga viðmerking

Samanumtikið

Samanumtikið eru vit harðliga ímóti, at hetta uppskotið verður samtykt.

Uppskotið sjálvt er als ikki lógartekniskt í lagi.

Støða verður ikki tikin til, hvussu lógaruppskotið fyriheldur seg til galdandi jarðarlógir.

Støða verður ikki tikin til, hvussu lógaruppskotið fyriheldur seg til ognarhugtakið og ognar- og avgerðarrættin hjá óðalsfólki. Grundleggjandi spurningar um t.d. ognartøku og endurgjald í mun til vanligu treytirnar sambært grundlógarinnar § 73, stk. 1, verða als ikki viðgjørd.

Uppskotið kemur als ikki inn á spurdómar viðv. ognarrættinum sambært grein 1 í 1. fylgisprotokoll til tann evropiska mannarættindasáttmálan, sum Løgtingið við lóg í ár 2000 gjørdi til part av føroyskari lóggávu, ella hvussu metast skal um proportionalitetin í mun til inntriv í ognar- og ræðisrættin hjá óðalsfólki.

Heldur ikki viðgerð uppskotið nakað um sambandið millum ásetingar í uppskotinum viðv. atgongd til privata ogn í mun til § 72 í grundlógini ella grein 8 (1) í evropeiska mannarættindasáttmálanum, ið báðar verja rættin til privatlív, familjulív, heim og samskifti. Tílík atlit eiga at viga tungt í metingini, tá ið fyrisitingarligar aktir skulu setast í gildi, sum gera inntriv í vard rættindi.

Júst hvussu lógaruppskotið fyriheldur seg til stýrisskipanarlógina burdi verið viðgjørt í uppskotinum, tí sum dømi kann nevnast ST-sáttmálin frá 16. desember 1966, sum Føroyar hava tikið undir við. Tann sáttmálin er sera viðkomandi fyri lutir og lunnindi og rættin hjá fólki at ráða yvir sínum ognum, sí art. 1, stk. 2:4:

"Alle folk kan til deres egne formål disponere frit over deres naturgivne rigdomskilder og ressourcer uden derved at gøre indgreb i forpligtelser hidrørende fra internationalt økonomisk samarbejde, der er baseret på princippet om gensidig fordel, og i folkeretten. Et folk må aldrig berøves sine eksistensmuligheder."

Atlitið at verju av ogn, heimi og familju kann sigast at renna saman við hugtakinum mentan sum mannarættur sambært ST-sáttmálanum, og hevur eitt lógaruppskot gildi, tá ið tað ger seg inn á rættin hjá óðalsfólki frítt at ráða yvir teirra ognum og lunnindum, sum staðfest er í ST-sáttmálanum, sum eisini fevnir um Føroyar?

Eisini kann nevnast, at lógaruppskotið als einki sigur um UNESCO-2003 sáttmálan, ið Føroyar hava tikið undir við, og sum verjir immateriella mentanararvin, sum aldargamla siðbundna seyðahaldið í Føroyum má sigast at vera ein sera týdningarmikil partur av. Fleiri túsund føroyskar familjur, um alt landið, hava borið hesa livandi mentan, gjøgnum fleiri ættarlið.

Eitt einfalt og greitt uppskot, ið tryggjar føroyingum ókeypis atgongd til haga og fjøll

Sum útgangsstøði meta vit tó ikki, at tað er neyðugt at lóggeva, at føroyingar hava rætt til at ganga í haganum.

Víst verður, enn einaferð, til felags yvirlýsing frá Óðals- og Bóndafelagnum, dagfest hin 12. februar 2024.

"Føroyingar skulu ganga frítt í haga, eftir eini pragmatiskari umsiting av galdandi lóggávu. Fundurin er samdur um, at útlendsk ferðafólk einans kunnu ganga ókeypis eftir útvaldum almennum bygdagøtum. Skulu tey út um bygdagøturnar, skal hetta verða eftir fyriskipaðum gongutúrum, sum hagarnir og føroyska ferðavinnan gera avtalur um. Ferðaleiðarar skulu verða føroyskir. "

Fyri at tryggja føroyingum framhaldandi frælsi, samstundis sum vit varðveita bestu stýringsamboðini, í galdandi jarðalógum, til at skipa stóra ferðafólkastreymin, so er tað umráðandi, ikki bara fyri óðalsfólk, men fyri allar føroyingar í felag, at "loysnin" til málið um "gongd í haga" ikki verður ein lógar-broyting. Men ein hugburðs-broyting.

Lættastu og rættastu loysnina, fyri føroyingar, hava vit longu í verandi siðvenju, og verandi jarðalógum, sum eru sprotnar úr okkara egnu mentan. Tað einasta sum krevst, er at vit virða ta einføldu skipan, sum verjir okkara náttúru og landbúnað best.

Ein verulig burðardygg ferðavinna krevur skilagóðar avmarkingar í nærumhvørvinum, við atliti til gagnnýtslu av landbúnaðarjørð og lunnindum, vernd av djóra- og fuglalivi, og ikki minst, lokala virðing fyri íbúgvunum úti um landið. Sum vit fleiri ferðir hava víst á, so kann alt hetta longu tryggjast, innan galdandi lóggávu.

Men metir politiski myndugleikin kortini, at tað er so umráðandi at staðfesta við lóg, at føroyingar skulu hava rætt at ferðast í egnum landi ókeypis, so er at staðfesta tað stutt og greitt, ikki í eini ferðavinnulóg sum snýr seg um rættindini hjá fremmandafólki, men í eini jarðarlóg, sum snýr seg um rættindini hjá føroyingum.

Tað kundi eitt nú verið ásett nakað soleiðis:

> § #. Øllum føroyingum skal vera loyvt at ganga uttan gjald og á annan hátt fara í haga sambært galdandi lóggávu, um tað ikki ger seg inn á teirra egnu trygd, og annars er til ampa fyri fólk, fæ, ogn, vøkstur, náttúru og raksturin av haganum.
>
> *stk. 2.* Øll vinnuliga gonga og ferðsla annars, skal skipast við loyvi og sambært teimum treytum sum ásettar eru av teimum, sum eiga ella sita við jørðini.

Hetta kundi eitt nú verið ásett í Lov nr. 171 af 18. maj 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.

FØROYA
ÓÐALSFELAG